## Fiorentina bjóðar av

Fiorentina nærkast oddinum í italsku Seriu A, har Inter liggur á odda. Um vikuskiftið spældi Fiorentina á heimavølli ímóti Udinese, og tað endaði við 4-2 sigri til Fiorentina. Tveir danskir spælarar eru í hópinum – Per Krøldrup og Martin Jørgensen – men hvørgin spældi við hesaferð. Fiorentina liggur nú fýra stig aftanfyri Inter í Seriu A.



## Bech er ikki gjørdur úr teflon

Mánadagin var Troels Bech sagdur úr starvinum sum venjari hjá Esbjerg, og hann bíðar nú eftir nýggjum áhugaðum felag, sum skal biðja hann koma til arbeiðis. Um vikuskiftið vann Esbjerg á Horsens, men Bech hugdi ikki eftir dystinum. - Eg haldi framvegis við liðnum, men eg eri ikki gjørdur úr teflon, og tað hevði verið ov hart at hugt eftir dystinum á stadion, sigur Troels Bech við JydskeVestkysten.

# Málleysur toppur

*Séamus John James Given, ella bara Shay Given, sum tey flestu kenna hann sum, spældi ein braddyst fyri Newcastle um vikuskiftið. Hinvegin sær John Terry úr Chelsea alt annað enn vælnøgdur út*

*Mynd: Polfoto*



**Hvørki Chelsea, Liverpool, Manchester United ella Arsenal megnaðu at skora um vikuskiftið, og tað er fyrstu ferð í 15 ár, at hesi fýra liðini hava verið málleys í sama umfari**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Seinast tað ikki eydnaðist nøkrum av liðunum, ið verða rópt »The Big Four«, at skora í sama umfari, var í 1993. Um vikuskiftið hendi tað so aftur. Hvørki Anelka, Torres, Ronaldo, Adebayor ella nakrar av hinum stjørnunum, ið manna Chelsea, Liverpool, Manchester United og Arsenal funnu málið hetta umfarið.

Men hóast eingi mál, so megnaðu trý av teimum fýra at halda egið mál reint, og harvið fingu tey eisini fingu eitt stig hvør.

### Úrslitini um vikuskiftið:

Sunderland - West Ham 0-1
Tottenham - Blackburn 1-0
Aston Villa - Manchester United 0-0
Liverpool - Fulham 0-0
Middlesbrough - Bolton 1-3
Manchester City - Arsenal 3-0
Portsmouth - Hull 2-2
Stoke - West Bromwich 1-0
Chelsea - Newcastle 0-0

### Støðan í Premier League:

1 Chelsea 33
2 Liverpool 33
3 Manchester United 25
4 Aston Villa 24
5 Arsenal 23
6 Hull 22
7 Everton 19
8 Portsmouth 19
9 Fulham 18
10 Middlesbrough 18
11 Manchester City 17
12 Bolton 17
13 West Ham 17
14 Stoke 17
15 Tottenham 15
16 Sunderland 15
17 Newcastle 14
18 Wigan 13
19 Blackburn 13
20 West Bromwich 11

Bæði Chelsea og Liverpool sóu út til at hava lutfalsliga lættar uppgávur á heimavølli. Chelsea ímóti Newcastle og Liverpool ímóti Fulham.

Liverpool spældi leygardagin. Fulham hevði ongantíð áður vunnið á Liverpool á Anfield, har Liverpool heldur ikki hevur tapt í 2008. Hesi hagtøl eru ikki broytt, men eftir at bæði liðini høvdu vunnið tríggjar sigrar á rað, máttu tey nú taka til takkar við einum javnleiki.

Sostatt hevði Chelsea møguleikan at leggja sjógv ímillum seg og Liverpool í oddinum. Men hóast at Chelsea hevði bóltin meginpartin av tíðini í dystinum ímóti Newcastle, so hevði útiliðið ein sannan brand í málinum. Shey Given tók alt, ið takast skuldi – eisini tvey stig frá Chelsea.

Í mun til Chelsea og Liverpool hevði Manchester United eina heldur truplari uppgávu á útivølli ímóti Aston Villa. Her hevði Manchester United veruliga hagtølini við sær, tí seinastu seks árini hevur felagið ikki sett stig til ímóti Aston Villa, umframt at Manchester United eisini hevði skorað í 36 teimum undanfarnu dystunum á rað. Henda góða gongd varð nullstillað leygarkvøldið, tá dysturin endaði málleysur. Eina stigið til Aston Villa merkir, at liðið sostatt leggur seg eitt stig framum Arsenal, og einans hevur eittans stigið upp til Manchester United.

### Merkisvert tap hjá Arsenal

Arsenal tapti fyri fimtu ferð higartil hetta kappingarárið um vikuskiftið. Undan dystinum hevði rumbul verið í Arsenal og serliga kring franska liðformannin William Gallas. Orsøkin var ein bókaútgáva, har Gallas eftir øllum at døma hevur verið ov opinskáraður. Úrslitið var, at Gallas varð settur av liðnum og ikki er liðformaður Arsenal longur.

Um tað var hetta, ið merkti Londonliðið leygardagin er ógreitt, men hvussu er og ikki, vann Manchester City ein tryggan 3-0 á Arsenal. Hetta er størsta tapið hjá Arsenal í 20 mánaðir, og samstundis er tað fyrstu ferð í hálvtannað ár, at Arsenal tapir tveir dystir á rað.

Málini hjá Manchester City gjørdu Ireland, Robinho og Sturridge. Málið frá Robinho var vakurt, og hevur brasiliumaðurin nú gjørt átta mál í 11 dystum.

Sigurin hjá City var ársins fimti. Men merkisvert er, at hóast lutfalsliga fáar sigrar, so hevur liðið tó skotið 29 mál, sum er meiri enn bæði Manchester United, Liverpool og Arsenal hava. Í roynd og veru er tað bara Chelsea, ið hevur skotið fleiri mál enn Manchester City í ár.

### Tottenham røttu megin markið

Tottenham fekk eina vanlukkuliga byrja upp á árið, men er undir Harry Redknapp komið aftur á beint. Farna vikuskiftið taptið liðið fyri fyrstu ferð undir onglendinginum, men sunnudagin kom Tottenham aftur á sigurskós, tá tað eydnaðist at basa Blackburn 1-0. Málið gjørdi Pavlyuchenko, tá bara níggju minuttir vóru spældir. Við sigrinum hálaði Tottenham seg upp um niðurflytingarmarkið.

Undir niðurflytingarmarkinum liggur millum annað Wigan, sum spælir ímóti Everton í kvøld.

Næsta vikuskiftið, og serliga sunnudagin verður aftur spennandi í Onglandi, tá tvær stórar grannauppgerð standa á skránni. Fyrst bresta Manchester City og Manchester United saman, og síðani Chelsea og Arsenal.